**Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Smærugøta 9A,**
**FR-100 Tórshavn, tlf 316973, fax 318516 fsn@fsn.fo www.fsn.fo**

Tórshavn tann 28. september 2017

**Hoyringsskiv**

**Løgtingsmál nr. 18/2017: Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**

Føroya Skipara - & Navigatørfelag (FSN) hevur hesar viðmerkingar:

1. Viðv. fiskidagar/kvotur.
   FSN mælir til at varðveita fiskidagaskipanina fyri botnfisk fyri heimaflotan.

2. Viðv bústaðarskyldu: *"Hevur verið skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum seinastu 10 árini".*

3. Viðv. útbjóðing av veiðurættindum : FSN tekur ikki undir við uppboðssølu av veiðurættindum, av nøkrum slag.

4. Føroya Skipara- & Navigatørfelag tekur ikki undir við, at: " Landsstýrismanninum verður heimilað á uppboði at bjóða út rættin at veiða ta nøgd"... Mælt verður til, at ein nevnd, har landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum er formaður, og sum hevur umboð úr øllum flokkum, verður sett at lata rættindi til kvotu av fiskidøgum, fyri botnfiskasløg, ella tons av uppisjóvar fiski, um mett verður, at tað er rúm fyri fleiri fiskiloyvum. Treytin fyri at fáa slíkt fiskiloyvir til at brúka, eigur at vera, at reiðarin hevur skip egnað til endamálið ella sannførandi kann útvega sær egnað skip til slíka veiðu. Og at viðkomandi persónur er skrásettur í Føroyum tey seinastu 10 árini. Allastaðni har tað stendur: " Landsstýrismanninum verður heimilað á uppboði at bjóða út rættin at veiða ta nøgd" verður mælt til: at ein nevnd, har landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum er formaður, og sum hevur umboð úr øllum flokkum, verður sett til at lata nýggj fiskiloyvir.

5. Viðv. menningarkvotum: FSN tekur undir við menningarkvotum. Men persónar/feløg, ið hava átt loyvir/kvotur, men hava selt tær, skula ikki fáa menningarkvotur.

6. **§ 51 Viðv. manningaviðurskiftum**: FSN mælir til, at manningin verður avroknað eftir sáttmálum millum tey føroysku núverandi manningarfeløg. Og um ásetingin í § 51 ikki verður fylgd, skula øll rættindi verða tikin frá tí skipið/virkið.

7. Viðv. uppboðssølu av veiddum fiski: FSN mælir til, at skipini skula hava frían møguleika fyri at selja á útlendskari uppboðssølu fyri at náa marknaðarprís, og at veiðuavgjaldið á 2,- kr/kg verður avtikið. Og at eingi almenn avgjøld verða sett á yvirhøvur fyri landing.

8. Viðv. stovnsrøkt: **FSN mælir til tvungnar legudagar**. Her verður hugsað um, har tað er møguligt at skip, "heimaflotin", skula liggja frá 23. des. og til og við 02. jan. árið eftir. Hetta grundað á stovnsrøkt og familjurøkt/virðir. Um langfaraflotin kemur heim, ella er heima, í hesum tíðarskeiði, skal hann koma undir somu treytir. Hetta er gjørligt út frá § 25, har loyvt verður at flyta 10% kg./fisk, tvørtur um ársskiftið.

9. § 18, stk. 1 - mælt verður til, at orðini "*á uppboði*" verða skift út við: Verða latin reiðara, ið hevur hóskandi skip og lýkur treytirnar í hesu lóg.

## Økisfriðingar

10. FSN mælir til, at tær økisfriðingar, sum verða gjørdar, skula verða gjørdar/broyttar við lóg, og ikki við kunngerð.

11. FSN tekur ikki undir við keyp og sølu av kvotum, men um tann reglan kemur ígjøgnum allíkavæl, so skal kostnaðurin verða skipara og manning óviðkomandi.

12. FSN er av tí áskoðan, at tann til eina og hvørja tíð sitandi landsstýrismaður/-kvinna, hevur so sum uppskotið er orðað, ov stórar heimildir.

13. FSN mælir til verandi skipan, at skip og veiðuloyvir hoyra saman. Tó so at kvota av kg/fisk ella fiskidøgum bert er ein brúksrættur.
Hetta tí at nýgg pop-upp reiðaríðir koma og fara, vit missa stýringina á manningaviðurskiftunum.

14. FSN tekur ikki undir við keyp og sølu av kvotum. Um so er, at uppboðssølan av kvotum kemur ígjøgnum, og virkir á landið/sjógvi "Verkssmiðjuskip" keypa part av kvotu, og vísa á annað skip at fiska, so skal manningin avroknast av marknaðar søluvirðinum av fiskinum.

15. Fiskidagar eiga ongantíð at verða avhendaðir frá reiðara til reiðara, men frá reiðara til landsstýri ella stovn undir tí, og so frá landsstýrinum til annan reiðara.

16. FSN tekur undir við fiskidagatalinum, ið er ásett fyri fiskiárið 2018. FSN mælur til, at fiskidagarnir altíð verða ásettir út frá ásetta fiskidagatalinum árið frammanundan, og eftir somu skipan, sum í verandi fiskidagaskipan, tó soleiðis:

*Dømi: Fiskidagatalið fyri tosk verður ásett út frá 10.000 tonsum av toski. Um tað, tá fiskiárið er liðugt, eru fiskað meira enn 10.000 tons av toski, so skal fiskidagatalið fyri tosk hækkast við tí lutfalli, sum er millum 10.000 tons og tað, ið fiskað varð av toski. Hinvegin, um fiskað verður*

*minni enn 10.000 tons av toski, so skal fiskidagatalið fyri tosk lækka við lutfallinum millum 10.000 og tað, ið fiskað varð av toski. Á sama hátt eigur at verða gjørt fyri øll fiskasløgini sum fiskidagarnir verða roknaðir út eftir. Mælt verður til at rokna út, hvussu sveiggið hevði verið í fiskidagatalinum, um omanfyri nevnda skipan hevði verið brúkt tey árini fiskidagaskipanin hevur verið.*

17. **Í § 24.** FSN mælir til at strika stk 1. Og at stk 2 í somu grein verður broyttur frá 25% til 100% Fsn er á tí áskoðan, at skip suma hava vart føroyagrunnin, við at søkja aðrar leiðir, muga ikki straffast fyri tað.

Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Annfinnur Garðalíð, form.